# Borgarafundur í Leirvík um vegaføring

**Seinastu fjúrtan dagarnar hava borgarar í Leirvík havt høvi at skrivað undir eitt mótmælisskriv, har mælt verður frá at leggja vegaføringina frá Norðoyatunlinum omanfyri bygdina og niðanfyri bygdarhúsið. Higartil hava eini 300 fólk skrivað undir mótmælisskrivið**



*Higartil hava einir 300 borgarar í Leirvík skrivað undir eitt mótmælisskriv, har mælt verður frá at leggja vegaføringina frá Norðoyatunlinum omanfyri Leirvíkar bygd og niðanfyri bygdarhúsið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Komandi fríggjakvøld klokkan 19 verður almennur pallborðsfundur í bygdarhúsinum í Leirvík. Tað er Filip Hansen í Leirvík, sum hevur tikið stig til fundin.

Filip sigur, at hetta í fyrsta lagi er ein stuðulsfundur til Leirvíkar bygdarráð, nú bygdarráðið er samt um, hvussu vegaføringin gjøgnum Leirvíkar bygd í sambandi við Norðoyatunnilin skal fremjast.

Á fundinum verða báðar ætlaninar, sum frammi eru – fjøruloysnin og vegur omanfyri bygdina – lýstar.

### Áhugavert pallborð

Tað verður Filip sjálvur, sum fer at leggja fyri á fundinum. Hann fer at greiða frá teimum báðum ætlanunum, sum tosað verður um í dag.

Við pallborðið fara eitt nú at sita politisk umboð, umboð fyri Landsverk, NCC og umboð fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd.

Fyrivarni verður tó tikið við, at allir partar enn ikki hava játtað luttøku á fundinum.

Filip Hansen sigur, at hann eisini hevur boðið øllum politiskum flokkum at senda umboð til fundin, bæði samgongu-og andstøðuumboðum.

– Á fundinum verður eisini høvið at seta fram spurningar, og vit vóna, at hetta verður ein góður fundur, soleiðis at vit eru komin loysnini nærri, tá ið fundurin er liðugur, sigur hann.

### Undirskriftir

Seinastu fjúrtan dagarnar hava fólk í Leirvík havt høvi at skrivað undir mótmælisskriv, sum hevur ligið frammi á Statoil í Leirvík og seinastu dagarnar eisini í handlinum hjá Rasmusi.

– Tey, sum skriva undir, mótmæla ætlanini at leggja vegaføringina úr Norðoyatunlinum omanfyri bygdina, tí henda ætlan eitt nú fer avstað við so nógvum og góðum byggilendi.

Filip Hansen sigur, at í mótmælisskrivinum, sum eini 300 borgarar í Leirvík higartil hava skrivað undir, verður ikki beinleiðis mælt til umrøddu fjøruloysnina, men mælt verður til, at vegaføringin verður niðanfyri bygdina og omanfyri havnalagið.



*Leirvíkingar stúra fyri nógvu ferðsluni, sum verður úr og í Norðoyatunnilin, nú eingin endalig loysn enn er fingin á spurninginum, hvussu vegaføringin skal loysast*

---

# Bowlinghøll í Trongisvági

TRONGISVÁGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Arbeiðsbólkurin hjá Tvøroyrar Bóltfelag (TB), sum varð settur at fyrireika bygging av bowlinghøll, er nú liðugur við sítt arbeiði.

Finn Thomsen sigur vegna arbeiðsbólkin, at alt fyrireikingararbeiði, eitt nú innheintan av tilboðum til bygging av høll og keypiav útgerð, er komið upp á pláss, soleiðis at nú er bert eftir hjá TB at taka støðu í málinum.

– Arbeiðsbólkurin mælir til, at bowlinghøllin verður bygd vestanfyri skúlan í Trongisvági – og um skjótt verður atborið, kann høllin standa liðug einaferð seint í summar.

Finn Thomsen væntar, at TB á aðalfundi sunnudagin fer at taka støðu í málinum um ætlaðu bowlinghøllina.

# Myndugleikarnir kunnu ikki ganga ímóti fólkinum

**Filip Hansen, sum hevur tikið stig til borgarafundin í Leirvík fríggjakvøldið, sigur seg vóna og vænta, at fólk sum heild fara at semjast um fjøruloysnina**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Eg eri fegin um, at vit nú hava eitt samt bygdarráð aftanfyri fjøruloysnina við tunli, og eg haldi, tað er úr vón og viti, um landsst‡rið fer at ganga ímóti einum samdum bygdarráð.

Filip Hansen sigur seg ikki ivast í, at umrødda fjøruloysnin hevur størst undirtøku millum borgarar í Leirvík – ikki minst, nú NCC saman við John Petersen hava sagt, at teir kunnu fremja hesa verkætlan fyri stívliga 85 miljónir krónur.

– Tað er rætt, sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at neystini og lendið, sum skal takast og kompenserast, ikki er við í hesum prísi, men tað er lendið heldur ikki, tá ið ræður um loysnina, sum Bjarni hevur róð uppundir.

Filip heldur ikki nógv um úttalilsini hjá Landsverki um metingarnar, sum stovnurin hevur gjørt sær av kostnaðarmetingini hjá NCC og John Petersen.

– NCC og John Petersen hava drúgvar royndir í slíkari bygging, og tí dugi eg ikki at síggja, hvussu Landsverk kann hava eina so øðrvísi meting.

Stigtakarin til borgarafundin vísir á, at við alternativu vegaføringini omanfyri bygdina og niðanfyri bygdarhúsið, fer verkætlanin avstað við nógvum góðum byggilendi, og haraftrat verður talan um ein rættiliga brattan veg oman í vegaføringina við Statoil.

– Aftrat hesum er ætlanin at hava eina rundkoyring úti við IRF-vegin, har bilar úr Norðoyatunlinum kunnu velja at fara eftir n‡ggja vegnum – ella ígjøgnum sjálva bygdina, sigur Filip Hansen.